Listafólkasamband Føroya
Lützenstrøð 4
FO 110 Tórshavn
lisa@lisa.fo
Tel +298220197

Tórshavn tann 19.03.2020

Til
Uttanríkis- og mentamálaráðið,
Fíggjarmálaráðið,
Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Skrivið er sent Mentanagrunni Landsins, Filmsgrunninum og Leiklistaráðnum til kunningar.

**Listaøkið við í næsta hjálparpakkan**
Í hesum corona tíðum eru vit øll rakt av avlýsingum og broytingum, ið fylgja við tiltøkunum hjá mynduleikunum í sambandi við smittuvandan.

Listaligar verkætlanir, listafólk og bólkar í øllum listagreinum, útinnandi eins og skapandi, verða fíggjarliga hart rakt av avlýsingum av framsýningum og framførslum og harvið væntandi sølu av verkum og atgongumerkjum.

Tað er sannlíkt, at hendan kreppan, heimssamfelagið er í, fer at ávirka innkeyp av verkum og atgongumerkjum langt fram í tíðina.

Listafólkasamband Føroya, LISA, vil við hesum skrivi heita á tykkum, at gera ein hjálparpakka og soleiðis fyribyrgja, at fíggjarligu avleiðingarnar hjá listafólkunum gerast ov álvarsligar og sleppast kann undan, at listaøkið tekur ov stóran skaða. Tað er umráðandi, at hjálparpakkin veitur hjálp, soleiðis at stuðulskipaninar kunna gera undantøk og at landið økjur um síni innkeyp av útinnandi og skapandi list og á henda hátt stuðlar upp undir at listaliga virksemi ikki dettur niður fyri.

Hjálparpakkin eigur at innihalda hesi átøk:

- Peningur verður játtaður til at fíggja tann meirkostna, ið kann standast av at verkæltanir verða útsettar ella detta niðurfyri.
- At kravið um afturgjald av peningastuðli skal fella burtur, um verkætlanin, ella tað, ið stuðulin er søktur til, ikki kann fremjast til tíðina, ella als ikki kann fremjast.
- Eykajáttan á fíggjarlógina 2020 til innkeyp av útinnandi og skapandi list.

Blíðar heilsur

Starvsnevndin
Marita S. Dalsgaard, forfólk, Hansina Iversen, næstforfólk og Jóhan Martin Christiansen, starvsnevndarlimur